
Løtuvinningur ella langsiktaðar loysnir

Frívikan einsamøll loysir onga kreppu



Nýhugsan skal til og øll politisk halgineyt mugu lúta fyri skilagóðum loysnum, skal lív vera lagað á klettum okkara, skrivar Tórfinn Smith, býráðslimur, millum annað

Bert í Havn virkaði í 1987 ikki færri enn 47 útlendskar fyritøkur,- boðsendar at taka lut í íløguballinum mikla

Stingur landsstýrið ikki langsiktaðar loysnir út í kortið verður neyvan gjørligt at sannføra nakað menniskja um, at ein frívika loysir nakra kreppu. Í dag at leita eftir syndabukkum loysir ongan trupulleika, men okkurt kundu vit lært av íløguballinum mikla í áttitiárunum, skrivar Tórfinn Smith, býráðslimur m.a. í sjónarmiði í dag

sjónarmið

Nú fingu vit eina ferð enn at vita, at tað vóru ikki bert politikararnir, men eisini Føroya fólk, sum hava ábyrgdina av teirri vanlukku støðu okkara neyðars land er komið í. Hesaferð frá Henningi Holten, búskaparfrøðingi og fyrrverandi limi í ráðgevandi nevndini.

Hevur Henning Holten hug at finna syndabukkar, hevur hann sjálvandi eisini loyvi til tess,- eisini um hann ger alt Føroya fólk til syndabukkar. Men hóast tað ongum endamáli tænir at útnevna tílíkar, loyvi eg mær at pástanda, at vanligi føroyingurin hevði sera lítla ávirkan á ørskapin, sum fór fram í áttatiárunum, og er tað tí ógvuliga ólogiskt, at geva tí sum Henning Holten nevnir Føroya fólki, skyldina.

Tað var ikki vanligi føroyingurin, sum ferð eftir ferð setti met í skeivum íløgum. Tað var ikki vanligi føroyingurin, sum rópti um flogvallir, berghol, undirsjóvartunnlar, ferjulegur, uttalandslán o.s.fr. Tað var heldur ikki vanligi føroyingurin, sum sendi boð eftir ikki færri enn 47 útlendskum fyritøkum sum í einum og sama ári - 1987 - virkaðu enntá bert í Havn.

Men tað var hinvegin hin vanligi føroyingurin, sum "bert" hevði sína sunnu fornuft at halda seg til frá lívsins skúla, sum ferð eftir ferð ávaraði ímóti tí tey kalla einum yvirupphitaðum fíggjarpolitikki. Men hinum vanliga føroyinginum lurtaði eingin eftir. Ikki fyrr enn nú ið gjaldast skal. Nú eru vit knappliga øll í sama báti, og skulu øll gjalda fyri íløguballið mikla. Tí er tað blóðskeivt, og ógvuliga ósakligt, at geva okkum vanligu føroyingum heitið syndabukkar.

Spara oyruni - krónurnar rulla

Nú vit eru við at saga greinini av, vit sjálvi sita á, er sanniliga boð eftir vanliga føroyinginum. Nú skal hann gjalda. Og tað hevur hann als einki ímóti. Væl at merkja, um ein ikki hevur ta fatan, at goldið verður niður í eitt botnleyst kar.

Tá senasta fíggjarlóg varð løgd fyri tingið segði landsstýrið seg rokna við, at einar 90 milliónir fóru at vænta í. Roknað var m.a. við eitt sindur meira av skatti í landskassan enn undanfarna ár.

At trúgva hesum má ein avgjørt hava verið landspolitikari. Tí eingin annar trúði tí. Og tað vísti seg eisini. Skjótt sást, at tað fóru ikki 90 milliónir at vænta í, men kanska einar 500. Panikkur kemur í landsstýrið, og samgongan rillar. Rentuskatturin fær eitt lítið spark uppeftir. Brennivínið og sigarettirnar eitt sindur størri. Eitt av spariltøkunum var so, at góðar 20 milliónir skuldu sparast innan almennu stovnarnar, og tað er júst hetta seinasta, sum kundir verið vert at hugt eitt sindur nærri at.

Úr einari skuffu í aðra

Av teimum 20 milliónunum, sum sparast skulu innan almennu stovnarnar, eru meginparturin lønir. Tað merkir so aftur uppsagnir, sum aftur merkir, at fólk verða flutt av einari almennari konto og yvir á aðra. Hana hjá Almannastovuni. Fólkini rinda sum er skatt, so hendan sparing man vera so sum so.

Tá arbeiðsloysistryggingin byrjar at virka um slakar tveir mánaðir, eru hesi fólk at finna í kartotekinum hjá hesi skipan. Havast skal í huga, at tá 2%-gjaldið varð ásett, var talið á arbeiðsleysum helvtina av tí tað er í dag, og koma so fleiri onnur aftrat kann ein og hvør siga sær sjálvum, at tey 2+2 prosentini skjótt vera munandi fleiri.

At siga fólki úr almennum starvi uttan at tey hava annað at fara í,- og helst eitthvørt innan útflutningsvinnuna, er lítið annað enn at flyta ein trupulleika úr einari skuffu í aðra.

Løtuvinningur?

Okkara fíggjarmálaráðharri hevur leingi gingið við einum hann sjálvur heldur vera genialum hugskoti. Allar lønir niður við 20 prosentum við tilsvarandi lækking av livikostnaðinum. Hetta er hann enn ikki komin á mál við, men so mikið langt hevur hann fingið landsstýrið nú, at fara øll fólk í Føroyum - í hvussu er innan tað almenna - at halda frí eina viku uttan løn, er nógv vunnið.

Tað er møguligt, og eg ivist ikki eina løtu í, at um fólk gjørdust sannførd um, at eitt tílíkt tiltak kundu bjarga okkum úr ringastu neyðini, hevði eingin nakað ímóti tí. Er hinvegin talan um ein løtuvinning fyri botnleysa karið, landskassin tykist at vera, er lítið skilagott í hesum tosi.

Frívikan

Vit kunnu einsvæl síggja í eyguni nú beinanvegin, at "súsa og dúsa" tilveran er av, og at vit mugu leggja okkum á eitt tænastustøði innan øll øki, sum svarar til okkara inntøkur. Í hesum sambandi loysir ein frívika ongan trupulleika.

Tað landsstýrið eigur at gera, er at stinga út í kortið ein langtsiktaðan politikk, har øll politisk halgineyt mugu lúta fyri skilagóðum loysnum. Nýhugsan skal til á øllum økjum, og ikki minst innan tað almenna, skal yvirhøvur verða lív lagað á hesum klettum.

Fiskasølustjórin segði í Sosialinum í vikuni, at við tí avmarkaða fiskarikidømi undir Føroyum, var neyvan plass fyri fleiri enn øðrum hvørjum føroyingi í Føroyum.

Hvussu mongum føroyingum, ið plass eru fyri velst sjálvandi um hvussu mikið hvør skal hava í part. Verða ov mangir barónar, verður sjálvandi minni í part til hini. Men hann hevur í hvussu er rætt í tí, at halda vit fram á somu leið, verða mong, ið mugu fara av landinum. Hvørji tey verða, er ikki ilt at gita. Tað verða tey fult arbeiðsføru í besta aldri, og tey, sum verða eftir eru pensionistarnir og tey í útbúgving. Hvør skal so gjalda útbúgvingina, pensiónirnar og arbeiðsloysisstuðulin til teirra, sum eftir eru? Á hendan hátt verður hitt føroyska samfelagið skjótt avfólkað.

Nýhugsan

Landsplanlegging hevur í mong ár verið eitt av gandaorðunum. Úrslitið er so sum so. Kanska var eitt hugskot at lati komm-